# Almanna- og heilsumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 11. desember 2025 |
| Mál nr.: | 25/28720-3 |
| Málsviðgjørt: | HP |
| Ummælistíð: | N/A |
| Eftirkannað: | 17. november 2025 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.**
(Áseting av pensjónsaldri)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 117 frá 9. desember 2024, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 4 verður strikað, og í staðin verður sett:

“**§ 4.** Fólkapensjónsaldurin er:
1) 67 ár fyri persón, ið er føddur áðrenn 1. juli 1957.
2) 67 ár og 6 mánaðir fyri persón, ið er føddur í tíðarskeiðinum 1. juli 1957 til 31. desember 1962.
3) 68 ár fyri persón, ið er føddur í tíðarskeiðinum 1. januar 1963 til 31. desember 1966.
4) 68 ár og 6 mánaðir fyri persón, ið er føddur í tíðarskeiðinum 1. januar 1967 til 30. juni 1969.
5) 69 ár fyri persón, ið er føddur aftan á 30. juni 1969.

*Stk. 2.* Í seinasta lagi 1. januar 2031 verður pensjónsaldur ásettur, galdandi frá 1. januar 2041.
*Stk. 3.* Í seinasta lagi 1. januar 2034 verður pensjónsaldur ásettur, galdandi frá 1. januar 2044.
*Stk. 4.* Pensjónsaldurin sambært stk. 2 og 3 verður ásettur við støði í mettari gongd í livialdrinum frameftir og haldførisútlitunum í føroyska búskapinum.”

**2.** § 5 a, stk. 2 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 2.* Framskundað pensjón kann tillutast persóni, ið er eldri enn 64 ár og 6 mánaðir. Frá 1. juli 2030 kann framskundað pensjón tillutast persóni, ið er fyltur 65 ár.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Føroyingar liva longur, og nógvir føroyingar liva eisini longur við góðari heilsu. Í 2005 kundi ein fólkapensjónistur vænta at liva í 16 ár, meðan í 2020 kann hann vænta at liva í 19 ár. Tað eru eisini nógvir føroyingar, sum eru virknir á arbeiðsmarknaðinum aftan á, at fólkapensjónsaldurin er rokkin. Høga arbeiðsvirknið hjá teimum eldru er eitt týðandi íkast til búskapin og er ein hjálp á einum sperdum arbeiðsmarknaði.

Men hóast høga arbeiðsvirknið hjá teimum eldru, verður neyðugt at tillaga pensjónsaldurin. Samstundis sum tað eru nógv, sum halda fram at arbeiða, tá tey fara um pensjónsaldurin, eru tað eisini nógv, sum gevast. Gongdin í økta livialdrinum fer sannlíkt at halda fram í nógv ár, og tað fer at leggja trýst á føroyska búskapin.

Sambært løgtingslóg nr. 66 frá 30. apríl 2018 um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. hækkaði pensjónsaldurin úr 67 ár til 67½ ár í 2024 og hækkar aftur til 68 ár 1. juli í 2030. Løgtingslógin hevur eisini ásetingar um, at pensjónsaldurin skal hækka frameftir, um so er, at livialdur føroyinga heldur fram at hækka. Gongdin seinastu 15 árini vísir, at væntaði livialdurin hjá fólkapensjónistum er øktur munandi. Í 2024 hækkar pensjónsaldurin, sum nevnt, við hálvum ári, men seinastu 10 árini er væntaði livialdurin øktur við 0,8 árum. Tað merkir, at livialdurin er øktur meira enn pensjónsaldurin.

Skal pensjónsaldurin hækka aftur, skal tað gerast í løgtingslóg, og tí verður hetta uppskotið lagt fyri Løgtingið.

Føroyski búskapurin er ikki haldførur, og avbjóðingin er, at tað ikki er javnvág millum almennu inntøkurnar og útreiðslurnar í framtíðini. Neyðugt er við munagóðum inntrivum, fyri at bøta um vantandi haldførið, og eitt av hesum inntrivum er at hækka pensjónsaldurin. Talið av fólkapensjónistum økist hvørt ár og fer at økjast í nógv ár fram. Samstundis økist livitíðin hjá fólkapensjónistum, og harvið eru tað fleiri ár, sum pensjónistar fara at fáa fólkapensjón.

**Tal av føroyingum, ávikavist 80 ár og eldri og 90 ár og eldri**




*Kelda: Hagstova Føroya*

Myndin omanfyri vísir, at í 2060 verða meira enn tvífalt so nógv fólk eldri enn 80 ár og úti við trífalt so nógv fólk eldri enn 90 ár. At tað verða fleiri eldri, fer eisini at hava við sær øktar útreiðslur til eldrarøkt og heilsuverk og fer eisini at leggja trýst á arbeiðsmarknaðin. Øktur pensjónsaldur fer at hava við sær, at økta livitíðin fer at blíva brúkt til fleiri ár á arbeiðsmarknaðinum, og tað stuðlar undir framtíðar fígging av vælferðarsamfelagnum, og bøtt verður um haldførið í føroyska búskapinum.

**1.2. Galdandi lóggáva**

Pensjónsaldurin er ásettur í § 4 í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. Pensjónsaldurin hevur til allar tíðir verið 67 ár, men hækkaði hann til 67½ ár fyri persónar, ið eru føddir í tíðarskeiðinum 1. juli 1957 til 31. desember 1962, og 68 ár fyri persónar, ið eru føddir aftan á 31. desember 1962. Pensjónsaldurin hækkaði sostatt til 67½ ár 1. juli í 2024 og hækkar til 68 ár 1. juli 2030.

Pensjónsaldurin, sum er ásettur í løgtingslóg um almannapensjónir o.a., verður eisini brúktur sum skilmark í øðrum skipanum og aðrari lóggávu. T.d. rættindi og skyldur sambært løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn (eftir hetta nevnt AMEG) fylgir pensjónsaldrinum í løgtingslóg um almannapensjónir. T.e., at persónur undir fólkapensjónsaldur rindar til grunnin, meðan fólkapensjónistar fáa útgjald úr grunninum.

Fólkapensjónistar rinda ikki til Barsilsskipanina og Arbeiðsloysisskipanina, men hava samstundis heldur ikki rætt til veitingar úr Barsilsskipanini og Arbeiðsloysisskipanini. Harumframt hava fólkapensjónistar lagaligari treytir hjá Heilsutrygd og gjalda lægri kringvarpsgjald.

Rætturin til flestu almannaveitingar steðgar við fólkapensjónsaldur. T.d. fyritíðarpensjón, framskundað pensjón, fyribils uppihaldsveiting, sjúkradagpeningur og lønarískoyti til tillagað starv. Lóggávan er soleiðis orðað, at rætturin til hesar veitingar sjálvvirkandi fylgir fólkapensjónsaldrinum. Tað merkir, at um fólkapensjónsaldurin hækkar, er ikki neyðugt at tillaga aðra lóggávu.

Til teirra, sum eru niðurslitin, og sum tí ikki megna at vera á vanliga arbeiðsmarknaðinum til fólkapensjónsaldur, eru skipanir, ið veita eitt uppihaldsgrundarlag. Hægsta fyritíðarpensjón er til teirra, sum ongan arbeiðsførleika hava. Miðal og lægsta fyritíðarpensjón er til teirra, ið hava varandi skert arbeiðsføri, men tó hava nakað av arbeiðsføri eftir.

Framskundað pensjón kann veitast trý ár áðrenn galdandi pensjónsaldur og er til tey, sum lúka treytirnar til fyritíðarpensjón. Tá skipanin við framskundaðari pensjón varð sett í verk í 2020, var aldursmarkið fyri at fáa rætt til veitingina 64 ár. Nú pensjónsaldurin er hækkaður til 67½ ár, er aldursmarkið í sambandi við framskundaða pensjón 64 ½ ár. Soleiðis sum galdandi lóg er orðað, hækkar aldursmarkið til 65 ár í 2030 og hækkar annars samsvarandi framtíðar hækkingum í pensjónsaldrinum.

Harumframt hava vit skipanina við tillagaðum størvum, har persónur við varandi skerdum arbeiðsføri, sum er á vanliga arbeiðsmarknaðinum, kann fáa lønarískoyti aftrat lønini frá arbeiðsgevara.

Persónur, ið hevur varandi skerdan arbeiðsførleika, kann ikki fáa fyritíðarpensjón, um tað er møguligt at seta í verk fyriskipan sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. Tað kann t.d. vera sum arbeiðsbúgving ella tillagað starv. § 5 í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. ásetir sostatt, at pensjón kann ikki tillutast persóni yngri enn 60 ár, um møguleiki er at seta í verk fyriskipanir, ið meira enn fyribils betra arbeiðsevnini, ella um møguleiki er fyri at útvega hóskandi arbeiði. Í praksis merkir hetta, at treytin um, at arbeiðsfremjandi tiltak skal roynast, áðrenn fyritíðarpensjón kann veitast, ikki er galdandi fyri tey, sum eru eldri enn 60 ár. Treytirnar at fáa játtað fyritíðarpensjón aftaná 60 ára aldur eru sostatt linari enn hjá teimum, sum eru yngri enn 60 ár. Hetta sæst eisini aftur í, at talið av fyritíðarpensjónistum eldri enn 60 ár er munandi hægri enn talið av fyritíðarpensjónistum yngri enn 60 ár.

Tað eru 25 til 30% av føroyingum, ið eru fyritíðarpensjónistar, sum fáa framskundaða pensjón ella eru í tillagaðum starvi, beint áðrenn fólkapensjónsaldurin verður rokkin. Harumframt kunnu vera persónar, sum fáa aðra almannaveiting, sum eru langtíðarsjúkrameldað, ella sum av øðrum orsøkum ikki eru á arbeiðsmarknaðinum.

Fólkapensjónistur, ið er føddur aftan á 1952, kann velja at útseta pensjónina, og afturfyri fær hann hægri pensjón seinni. Tað eru einans grundupphæddin og viðbótin í fólkapensjónini, ið kunnu útsetast. Hækkaða pensjónin verður útgoldin sum ein sokallað bíðiviðbót. Tað eru í løtuni uml. 550 persónar, ið hava útsett pensjónina. Persónur við útsettari pensjón hevur fleiri av somu fíggjarligu fyrimunum sum ein fólkapensjónistur. Útgjald frá AMEG kann ikki útsetast, og persónur við útsettari pensjón fær í 2025 sostatt 6.455 kr. um mánaðin frá AMEG (ikki tongt at inntøku), umframt at hann ikki rindar arbeiðsmarknaðargjøld.

Ein týðandi partur av teimum, sum eru beint omanfyri pensjónsaldur, eru virkin á arbeiðsmarknaðinum. Nøkur fáa lutvísa fólkapensjón, meðan onnur hava útsetta pensjón. Tað eru sostatt nógv, sum eru fullfør á arbeiðsmarknaðinum og hava vanligar arbeiðsinntøkur, men sum samstundis fáa ágóða av pensjónsskipanini. Hesi hava munandi betri fíggjarligar umstøður samanborið við persónar undir fólkapensjónsaldur.

Verandi áseting um pensjónsaldur varð samtykt í 2018 við gildiskomu 1. desember 2019, og samstundis varð ein sonevnd indeksering sett í lógina. Ásetingin í § 4, stk. 3 er soljóðandi:

"*Fólkapensjónsaldurin fyri persón, ið er føddur eftir 31. desember 1962 verður hækkaður, um so er, at miðallívstíðin sambært eini meting frá Hagstovuni fyri tey 65-ára gomlu seinastu 2 árini fer upp um lívstíðina í 2013-2014, ið var 85,5 ár. Lívstíðin verður gjørd upp sum eitt einfalt miðaltal fyri menn og kvinnur. Um lívstíðin er hægri enn 85,5 seinastu 2 árini, ásetur landsstýrismaðurin fólkapensjónsaldurin samsvarandi lívstíðini fyri tey 65-ára gomlu seinasta árið lagt afturat ein treytaður vøkstur í lívstíðini á 0,2 ár og frádrigið eitt fólkapensjónstíðarskeið á 18 ár. Avrundað verður niður til næsta hálva ár.*"

Ásetingin er orðað við íblástri úr eini líknandi áseting í donsku almannapensjónslógini. Mett verður tó, at frymilin at framskriva pensjónsaldurin ikki í nóg stóran mun tekur hædd fyri, at føroyska hagtalsgrundarlagið er munandi veikari, og tí er vandi fyri, at framskrivingin verður ov óneyv. Korona farsóttin hevur eisini skeiklað hagtølini einstøk ár, tó uttan at tað fer at ávirka gongdina í livitíðini frameftir. Men um frymilin omanfyri skal brúkast til at áseta pensjónsaldurin í 2035, fer skeiklingin at ávirka úrslitið, og sostatt verður pensjónsaldurin ikki ásettur samsvarandi veruligu gongdini í livialdrinum.

Verandi orðing um indeksering og verandi orðing um, hvussu pensjónsaldurin í verki skal ásetast er tó ikki greitt í galdandi lóg.

Umframt ásetingarnar um, hvussu pensjónsaldurin frameftir skal ásetast, stendur í galdandi lóg, at pensjónsaldurin ikki kann hækka við meira enn hálvum ári, fimta hvørt ár.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**

Endamálið við uppskotinum er at betra um haldførið í føroyska búskapinum. Hátturin at áseta pensjónsaldurin í framtíðini verður broyttur við hesum uppskotinum. Í verandi lóg er ásett ein indekseringsskipan, sum hevur til endamáls onkursvegna sjálvvirkandi at hækka pensjónsaldurin, um tað vísir seg, at livialdurin økist. Tað er tó ikki greitt í lógini, hvussu sjálv ásetingin skal fremjast í verki. Ásetingin um indeksering av livialdrinum árini frameftir verður strikað við hesum uppskotinum. Í staðin er ásett, at Løgtingið í seinasta lagi 1. januar 2031 skal taka støðu til pensjónsaldurin, galdandi frá 1. januar 2041. Og í seinasta lagi 1. januar 2034 skal Løgtingið taka støðu til pensjónsaldurin, galdandi frá 1. januar 2044.

Við uppskotinum hækkar pensjónsaldurin við einum hálvum ári hvørja ferð. Fyrstu ferð í 2035, tá pensjónsaldurin hækkar til 68 ár og 6 mánaðir, og seinastu ferð í 2038, tá pensjónsaldurin hækkar til 69 ár. Avgerðin um, at pensjónsaldurin skal hækka, er tikin við støði í framrokningum av væntaða livialdrinum hjá 67 ára gomlum føroyingum.

**Framrokning av væntaða livialdrinum hjá 67 ára gomlum**




*Kelda: Poul Christoffer Thomassen, aktuarur (sí fylgiskjal 2)*

Tá pensjónsaldurin hækkar, so lækka útreiðslurnar til fólkapensjón tilsvarandi. Bæði beinleiðis útreiðslur til pensjón lækka, men eisini útreiðslur til bíðiviðbót lækka, tá færri útseta pensjónina. Samstundis hava løntakarar og onnur longri tíð at spara upp til egna pensjón, ið aftur merkir hægri inntøkugrundarlag, tá sjálv fólkapensjónin verður ásett.

Talvan niðanfyri vísir gongdina í pensjónsaldrinum higartil, og gongdina frameftir, sum hetta uppskotið hevur við sær.

| Ár | Fólkapensjóns-aldur | Galdandi fyri persónar føddir í tíðarskeiðinum |
|---|---|---|
| Inntil 1. juli 2024 | 67 | Áðrenn 1. juli 1957 |
| 1. juli 2024 | 67 ár og 6 mánaðir | 1. juli 1957 til 31. des. 1962 |
| 1. juli 2030 | 68 ár | 1. jan. 1963 til 31. des. 1966 |
| 1. januar 2035 | 68 ár og 6 mánaðir | 1. jan. 1967 til 30. juni 1969 |
| 1. januar 2038 | 69 ár | Aftaná 30. juni 1969 |
| 1. januar 2041 | Ásetast í seinasta lagi 1. januar 2031 | |
| 1. januar 2044 | Ásetast í seinasta lagi 1. januar 2034 | |

Pensjónsaldur til og við 68 ár varð ásettur við løgtingslóg nr. 66 frá 30. apríl 2018. Hetta uppskotið hevur sostatt við sær, at pensjónsaldurin hækkar úr 68 árum stigvíst upp til 69 ár.

Tá pensjónsaldurin hækkar, økjast eisini árini, sum aðrar almannaveitingar verða veittar. Aðrar almannaveitingar, so sum fyritíðarpensjón, fyribils uppihaldsveiting, sjúkradagpeningur og framskundað pensjón kunnu veitast, inntil fólkapensjónsaldurin er rokkin. Umleið 25 til 30 prosent av 66 ára gomlum fáa eina varandi almannaveiting, t.e. fyritíðarpensjón, framskundaða pensjón ella eru í tillagaðum starvi. Hækkaður pensjónsaldur merkir eisini, at nakrir persónar leggjast aftrat og fáa fyritíðarpensjón ella framskundaða pensjón.

Hetta uppskotið hevur eisini við sær, at aldursmarkið til framskundaða pensjón verður ásett til 65 ár, tá pensjónsaldurin hækkar næstu ferð tann 1. juli 2030. Tað merkir, at hóast pensjónsaldurin hækkar aftur í 2035 og árini frameftir, verður aldursmarkið til framskundaða pensjón verandi á 65 árum.

Ásetingin í § 5 í almannapensjónslógini verður eisini óbroytt, soleiðis, at persónur eldri enn 60 ár ikki skal royna arbeiðsfremjandi tiltak, áðrenn fyritíðarpensjón kann játtast. Sostatt verður tað eins og í dag styttri vegur til fyritíðarpensjón hjá persónum, sum eru eldri enn 60 ár.

Hækkaður pensjónsaldur ávirkar útsetta pensjón soleiðis, at tíðin, sum bíðiviðbót verður uppspard, verður styttri, og harvið verða útreiðslur til bíðiviðbót í framtíðini eisini lægri.

Framrokningar vísa, at miðal livitíðin hjá føroyingum fer at hækka komandi árini (sí fylgiskjal 2). Hetta uppskotið hevur við sær, at longda livitíðin verður brúkt til fleiri ár á arbeiðsmarknaðinum. Pensjónsskipanin verður við uppskotinum meira burðardygg. At pensjónsaldurin verður ásettur fram til 2037 merkir eisini, at góð tíð er at leggja sær pensjónstilveruna til rættis.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Pensjónsaldurin hækkar stigvíst við 6 mánaðum í 2035 og aftur við 6 mánaðum í 2038, tá pensjónsaldurin verður 69 ár. Uppskotið ásetir, at Løgtingið í seinasta lagi 1. januar 2031 skal taka støðu til pensjónsaldurin galdandi frá 1. januar 2041 og aftur í 2034 skal taka støðu til pensjónsaldur, galdandi frá 1. januar 2044. Avgerðin skal vera grundað á gongdina í livialdrinum og haldførisútlitini í føroyska búskapinum.

Aldursmarkið til framskundaða pensjón, sum í verandi skipan er ásett at vera trý ár áðrenn fólkapensjónsaldur, verður ásett til at vera 65 ár frá 1. juli 2030. Tað merkir, at aldursmarkið

ikki fer at fylgja fólkapensjónsaldrinum, tá fólkapensjónsaldurin hækkar frá 2035. Aldursmarkið verður verandi á 65 árum.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Hetta uppskotið er í stóran mun óbroytt samanborið við uppskotið, ið var lagt fyri Løgtingið tíðliga á vári 2025 (løgtingsmál nr. 73/2024). Løgtingsins Trivnaðarnevnd hevði fundir við hoyringarpartar, og sambært álitinum frá nevndini mæltu fleiri av hoyringarpørtunum til, at pensjónsaldurin ikki eigur at hækka so títt, sum uppskotið legði upp til, ikki minni enn eitt hálvt ár í senn, og at tað eigur at vera meira gjøgnumskygt, hvør pensjónsaldurin er fyri hvønn aldursbólk. Sostatt mælti nevndin til, at pensjónsaldurin í staðin skuldi hækka við hálvum ári í senn – fyrstu ferð í 2034. Landsstýrið hevur tikið avgerð um at fylgja tilmælinum frá Løgtingsins Trivnaðarnevnd, tó at hækkingin í pensjónsaldrinum verður í 2035, heldur enn í 2034.

Sambært upprunaliga uppskotinum frá á vári 2025 skuldi pensjónsaldurin hækka til 70 ár í 2042. Landsstýrið hevur við hesum uppskotinum tikið avgerð um, at pensjónsaldurin fyribils skal hækka til 69 ár í 2038.

Aðrar broytingar eru ikki gjørdar í uppskotinum, og tí er avgerð tikin um, at uppskotið ikki umaftur skal sendast til ummælis. Vísast kann til ummælisviðgerðina í fylgiskjali nr. 2 í løgtingsmáli nr. 73/2024.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið fer at tálma trýstinum á almennu kassarnar. Hægri pensjónsaldur merkir, at landið sparir pensjónsútreiðslur, og hægri pensjónsaldur kann halda fólki longri á arbeiðsmarknaðinum, sum gevur skattainntøkur til land og kommunur.

Fíggjarmálaráðið hevur fyribils mett um fíggjarligu avleiðingarnar, sum uppskotið hevur fyri tað almenna. Metingin skal takast við fyrivarni, men kann geva eina mynd av væntaðu fíggjarligu avleiðingunum.

Allar metingar eru í dagsins prísum.

***Útgjald av fólkapensjón***

Útgjaldið til egna eftirløn verður lutvíst mótroknað í fólkapensjónini. Fyri at meta um pensjónsútreiðslurnar í 2035 og fram, mugu vit tí gera ein meting av eftirlønaruppsparingini hjá hesum fólkum, tá tey røkka pensjónsaldri. Síðani 2014 eru fólk kravd at spara upp til egna eftirløn, og samstundis vóru krøv sett um, at í mesta lagi 15% av uppsparingini kundi rindast út sum kapitalpensjón. Kravda eftirlønarinngjaldið var í 2014 1% og hækkar stigvíst fram í móti 2026 til 12%.

Tey, ið fyrst verða rakt av hækkaðum pensjónsaldri, verða tí í størstan mun mótroknað frá inngjøldunum síðstu 20 árini áðrenn pensjónsaldur. Bert inntøka, sum liggur omanfyri 61.900 kr. um árið, verður mótroknað í fólkapensjónini. Fíggjarmálaráðið metir, at nýggir pensjónistar í 2035 við verandi reglum í miðal fáa umleið 7.000 kr. í fólkapensjón um mánaðin. Ein øking í pensjónsaldrinum á 1 ár merkir tí eina sparing í útreiðslum hjá landinum til fólkapensjón á uml. 50 mió. kr.

Beinleiðis útreiðslurnar til fólkapensjón fara at lækka. Men samstundis fara útreiðslur til fyritíðarpensjón, tillagað starv og aðrar almannaveitingar at hækka nakað.

Sum frálíður, tá fólk í størri mun hava spart upp til egna pensjón, minkar árliga sparingin av hækkaða pensjónsaldrinum, tí fólk tá fáa minni í fólkapensjón.

***Skattur av øktum arbeiðsútboði***

Tá pensjónsaldurin hækkar, kann hugsast, at fólk eisini fara at arbeiða longur. Men tað er ikki víst, at øll arbeiða eitt ár longur, tá pensjónsaldurin hækkar eitt ár. Longu áðrenn fólk hava rokkið pensjónsaldur, er umleið ein fjórðingur av arbeiðsfjøldini farin av arbeiðsmarknaðinum, harav fleiri av heilsuávum. Tað er ikki hugsandi, at hesi verða nógv longur á arbeiðsmarknaðinum, tá pensjónsaldurin hækkar.

Somuleiðis eru tað eisini fleiri, sum arbeiða longur enn pensjónsaldur. Tølini fyri arbeiðsvirkni vísa, at síðstu 20 árini er arbeiðsvirknið hjá fólki um pensjónsaldur hækkað spakuliga. Hetta hóast pensjónsaldurin hevur verið óbroyttur. Hetta bendir á, at tað eru onnur viðurskifti, enn almenna pensjónin, sum gera av, nær fólk gevast. Ein meting frá Fíggjarmálaráðnum er, at 400 arbeiðsvirkin í hvørjum árgangi arbeiða fyri 300.000 kr. fyri hvørt ár, ið pensjónsaldurin hækkar. Hetta merkir, at skattskylduga inntøkan veksur 120 mió. kr., og skattainntøkan av hesum verður um 50 mió. kr. til land og kommunur.

Sum frálíður, tá fólk í størri mun hava spart upp til egna pensjón, kann roknast við, at almenni pensjónsaldurin hevur minni ávirkan á, hvussu leingi og hvussu nógv fólk fara at arbeiða.

*Aðrar fíggjarligar avleiðingar.*
Tað eru fleiri gjøld og skattir, sum gera mun á pensjónistum og øðrum, so at pensjónistar sleppa lættari. T.d. rinda pensjónistar ikki barsilsgjald, til AMEG ella ALS. Somuleiðis rinda pensjónistar lægri kringvarpsgjald og lægri egingjald fyri heilivág. Ein hægri pensjónsaldur gevur tí eisini av hesum orsøkum hægri almennar inntøkur og lægri útreiðslur.

Fyri AMEG viðførir ein hægri pensjónsaldur í sær sjálvum ikki, at haldførið batnar, tí alt inngjaldið skal rindast út aftur sum frálíður. Ætlanin hjá landsstýrinum er tó, at hetta skal vera partur av haldførinum, og landsstýrið fer tí í næstum at viðgera, hvussu tað kann gerast.

*Samlað*
Fyribils metingin er, at hækkaði pensjónsaldurin úr 68 ár til 69 ár alt í alt betrar um almenna raksturin við 70-100 mió. kr. um árið. Tá eru avleiðingar fyri AMEG ikki taldar við.

Broytingin verður framd soleiðis, at pensjónsaldurin hækkar hálvt ár í 2035 og hálvt ár í 2038. Tí verður metta árliga almenna rakstrarsparingin knappar 50 mió. kr. frá 2035 og aftur tað sama frá 2038.

Um hildið verður áfram t.d. soleiðis, at pensjónsaldurin hækkar hálvt ár í 2041, 2044 o.s.fr. kann roknast við, at árliga rakstrarsparingin minkar nakað hvørja ferð, tí arbeiðsútboðið sannlíkt ikki veksur líka nógv, hvørja ferð pensjónsaldurin hækkar.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Yvirskipað hevur uppskotið jaligar avleiðingar fyri vinnuna. Føroyingar verða longur á arbeiðsmarknaðinum, og sostatt økist arbeiðsútboðið og arbeiðsfjøldin. Tað hevur ein ávísan týdning, at avtalur um tryggingar fram til pensjónsaldur fyri bólkar av kundum (eitt nú fakfeløg) skulu um somu tíð galda fyri kundar, sum hava ymiskan pensjónsaldur. Hetta er tó eisini galdandi í dag, tí pensjónsaldurin sambært galdandi lóg er hækkaður í 2024 og hækkar aftur í 2030.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Uppskotið verður ikki mett at vera í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS**
   Uppskotið verður ikki mett at stríða ímóti Evropeiska mannarættindasáttmálanum.

3) **Sáttmáli sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri Sáttmála sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Ein persónur, ið fær almannapensjón, og sum flytur millum londini í ríkisfelagsskapinum, fær ikki fólkapensjónina við sær. Í staðin flytur viðkomandi til pensjónsskipanina, sum er galdandi í landinum, sum viðkomandi flytur til. T.d. tá fólkapensjónistur flytur úr Føroyum til Danmarkar, steðgar føroyska fólkapensjónin, og viðkomandi fær í staðin danska fólkapensjón. Tá pensjónsaldurin er ymiskur í londunum, kann tað tí fáa fíggjarligar avleiðingar at flyta frá einum landi til eitt annað.

Søguliga hevur pensjónsaldurin í Føroyum og Danmark verið tann sami (67 ár). Fyri umleið 20 árum síðani lækkaði pensjónsaldurin í Danmark til 65 ár, men síðani 2019 er hann stigvíst hækkaður aftur, soleiðis at hann í dag er 67 ár. Í Danmark er avgerð tikin um at hækka pensjónsaldurin enn meira, soleiðis at hann í 2035 verður 69 ár. Í 2025 skal danska Fólkatingið taka avgerð um, um pensjónsaldurin í 2040 skal hækka til 70 ár.

Í Føroyum er avgerð tikin um, at pensjónsaldurin í 2030 hækkar til 68 ár. Við hesum uppskotinum hækkar pensjónsaldurin í tíðarskeiðinum 2035 og 2038 stigvíst til 69 ár. Sostatt hevur uppskotið við sær, at pensjónsaldurin í Danmark og Føroyum nærum fylgjast.

Uppskotið ávirkar ikki markaforðingar millum Norðurlond. Føroyska almannapensjónin er fevnd av norðurlendska sáttmálanum um sosiala trygd, og tað merkir, at flytur ein millum Føroyar og eitt annað Norðurland, so fær viðkomandi sosialu pensjónina við sær úr landinum, sum flutt verður frá.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið, stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar kendar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
*Til nr. 1*
Fólkapensjónsaldurin er treytaður av dagfestingini fyri, nær ein er føddur. Ásetingin vísir, hvør pensjónsaldur er galdandi fyri persónar, ið eru føddir í nevndu tíðarskeiðunum.

Tað er ásett í stk. 2, at pensjónsaldur galdandi frá 1. januar 2041 verður ásettur í løgtingslóg í seinasta lagi 1. januar 2031. Tað merkir, at eitt uppskot um pensjónsaldur skal leggjast fyri Løgtingið, sum ásetir aldurin galdandi frá í fyrsta lagi 2041. Somuleiðis er ásett í stk. 3, at pensjónsaldur, galdandi frá 2044 á sama hátt verður ásettur í løgtingslóg í seinasta lagi 1. januar 2034. Stk. 4 ásetir, at ásetti pensjónsaldurin skal taka støði í framrokning um væntaðan livialdur og haldførisútlitini í føroyska búskapinum. Í fylgiskjali 2 í hesum uppskotinum er ein framrokning av væntaðum livialdri, og tá pensjónsaldurin skal ásetast aftur, skal ein nýggj framrokning gerast.

*Til nr. 2*
Sambært higartil galdandi áseting hevur aldursmarkið fyri framskundaðari pensjón verið trý ár áðrenn fólkapensjónsaldur. Síðani 1. juli 2024 hevur fólkapensjónsaldurin verið 67½ ár, og tað merkir, at síðani tá hevur markið fyri framskundaðari pensjón verið 64½ ár. Tá fólkapensjónsaldurin hækkar næstu ferð tann 1. juli 2030 til 68 ár, hækkar aldursmarkið til framskundaða pensjón til 65 ár. Við hesum uppskotinum verður "3 ár áðrenn galdandi pensjónsaldur" strikað, og staðin verður ásett, at framskundað pensjón kann tillutast persóni, ið er fyltur 64½ ár. Tað er sostatt óbroytt samanborið við galdandi lóg. Ásett er eisini, at frá 1. juli 2030 kann framskundað pensjón tillutast persóni, ið er fyltur 65 ár.

Broytingin hevur við sær, at markið fyri framskundaða pensjón aftaná 2030 ikki hækkar samsvarandi framtíðar hækkingum í pensjónsaldrinum. Og sostatt hækkar markið ikki aftur, hóast pensjónsaldurin aftur hækkar í 2035 og aftur í 2038.

**Til § 2**
Gildiskoma

Almanna- og heilsumálaráðið, 11. desember 2025

**Margit Stórá**
landsstýriskvinna

/ Bjørgfríð Ludvig

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Frágreiðing um pensjónsaldur